

# Statoil hevur møguleikan at spara enn meiri

**Jan Müller**

11.06.2014 - 11:48

Oljan.fo

Tað er ikki nóg mikið hjá Statoil at spara seks milliardir krónur um árið. Tað ber til at spara meiri, og harumframt skal felagið selja nakrar av sínum ognarlutum.

Longu í februar boðaði fíggjar- og búskaparsrtjórin hjá Statoil, Torgrim Reiten, frá, at Statoil fór at leggja seg eftir at fáa betri tamarhald á útreiðslunum. Til 2016 skuldi felagið skarva 30 milliardir krónur av ætlaðum íløgum, og frá 2016 og frameftir skuldu 8 milliardir krónur skarvast av teimum árligu útreiðslunum.

Torgrim Reiten sigur, at í oljuvinnuni plaga tey at taka til, at støðan er krevjandi, men at nú vil hann heldur siga, at støðan er álvarssom.

-Ein skuldi hildið, at vit høvdu stórt avlop og yvirflóð av pengum, nú oljuprísurin hevur verið oman fyri 100 dollarar í langa tíð, men so er ikki, sigur hann.

Í hálvt annað ár hevur leiðslan arbeitt við ætlanini um tað nýggja Statoil, og eitt umfatandi arbeiði við at skerja útreiðslurnar er longu farið í gongd. Og sambært fíggjar- og búskaparstjóranum eru íleggjararnir fegnir um stigið, sum leiðslan hevur tikið.

-Eg havi altíð brúkt nógva tíð saman við íleggjarunum, og í løtuni er hýrurin sera góður. Teir meta, at tað, sum vit gera, er tað rætta, sigur Torgrim Reiten við Stavanger Aftenblad.

Longu í februar kunngjørdi hann, at eitt høvuðsmál til at skerja útreiðslurnar hjá felagnum var at útvega eigarunum størri vinningsbýti. Tað vakti eftir øllum at døma ans, tí síðani er virðið á partabrøvum í Statoil vaksið 30 prosent. Tað seinasta árið er vøksturin 50 prosent.